Tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Manglandi almenna luttøkan

## *Oddagrein*

AUGUST var hendingaríkur, tá tað um nýggju og komandi frálandavinnuna umræður. Tá vórðu fyrstu loyvini at leita eftir olju og gassi á føroyska landgrunninum latin á samkomu í Norðurlandahúsinum. Og tá luttóku føroyingar eisini á stórari framsýning í Stavanger. Við hesum báðum hendingum ber til at siga, at kjølurin er strektur til hesa nýggju vinnuna. Tann dagur, tá vinnan av álvara fer av bakkastokki, liggur tó ikki so langt frammi í tíðini - nevniliga tá fyrstu boripallarnir ella skipini koma inn í føroyskan sjógv og bókstaviliga seta hol á undirgrundina og vónandi finna olju.

TÁ hugt verður í bakspeglið má sigast, at føroyingar, politikarar og fakfólk, stórt sæð hava verið samd um bæði mál og mið í hesum útviklingi. Eitt stig er tikið í senn og dentur hevur verið lagdur á at draga eina línu.

KORTINI hava verið og eru ymsar meiningar um, hvussu henda nýggja vinna skal handfarast. Tað hevur m.a. gjørt seg galdandi í loyvistreytunum. Og her eru tað serstakliga tvey mál, sum hava elvt til ósemju. Tað er spurningurin um oljuútgerðarhavnina og um almenna luttøku.

NÓGVIR tingmenn vildu hava fest niður í lógina, at alt oljuvirksemi skuldi ganga út frá Suðuroynni, tí mett varð, at oyggin átti at fáa ein týðandi leiklut í hesi nýggju vinnu. Meiriluti varð tó ikki fyri hesum. Ístaðin var samtykt at heita á vinnuna um eisini at leggja virksemi út kring landið.

ANDSTØÐAN á tingi vildi eisini hava eitt alment oljufelag ella optión hjá slíkum við í treytirnar, sum vit seta oljufeløgunum. Men hetta varð av ongum, tí landsstýrið og embætisfólk tess mettu tað ikki vera rætt í hesum fyrsta umfarinum at seta eitt slíkt krav fram. Mett varð, at hetta kundi styggja fleiri av oljufeløgunum burt. Nú gera so formenninir í báðum teimum stóru andstøðuflokkunum aftur vart við hetta mál og siga, at tað var eitt stórt mistak, sum landsstýrið gjørdi, tá tað ikki tók almennu luttøkuna longu frá byrjan í størri álvara. Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard eru sera avgjørdir og samdir. Landsstýrið hevur avreitt nýggju vinnuna til privat áhugamál og hevur fullkomiliga gloymt almennu Føroyar.

LANDSSTÝRIÐ hevur í sera stóran mun fylgt tilmælunum tað hevur fingið frá sínum embætisfólkum. Nú kann verða spurt, um hetta var røtt ella skeiv ráðgeving. Oljumálastýrið hevur eisini havt sínar ráðgevar, sum uttan iva hava mælt til ikki at hava almenna luttøku við frá byrjan men heldur seta treytirnar inn í skattapartin. Spurningurin er: var hetta ein røtt avgerð? Í november fer løgtingið undir eitt aðalorðaskifti um oljutilgongdina, og tá fer hesin spurningurin uttan iva at standa sera frammaliga saman við spurninginum um avleiðingarnar nýggja vinnan fer at hava á føroyska samfelagið.

***Sosialurin***

## Viðmerkingar:

# Heimleys í Havn – heimleys í Føroyum

**Ping-pong-spælið millum lands- og kommunular myndugleikar um hvør hevur ábyrgdina, tænir bert einum endamáli: Tey heimleysu gerast alt fleiri. Og fyri land og kommunur gerst tupulleikin ein enn størri skaði og skomm**



At Frelsunarherurin ger eitt stórt vælgerandi arbeiði eru helst øll samd um. At aðrir vælgerandi felagsskapir eisini gera eitt stórt arbeiða til frama fyri tey veikastu í samfelagnum, eru helst eisini øll samd um. Hesum setur eingin eitt einasta spurnartekin við. Spurnarteknini, fólk seta, er við tað almenna. Hvat ger landið og hvat gera kommunurnar.

Nógv verður tosað um býtið millum land og kommunur. Og tað av røttum. Men eftir mínum tykki eigur eisini eitt kjak at fara fram um býti av uppgávum á sosiala økinum, um hvør skal taka sær av uppgávunum: Privatir felagsskapir ella tað almenna.

Skal tað framhaldandi vera uppgávan hjá eitt nú Frelsunarherinum at taka sær av teimum veiksastu í samfelagnum ella er tað ein samfalagsauppgáva?

Eftir mínum tykki er heilt greitt, at tað er hægsti almanna myndugleikin í landinum, sum stingur út leiðina.

Og hetta av teirri einføldu orsøk, at uppgávan kann rætt og slætt ikki loysast kommunalt,- væl at merkja, um javnbjóðis rættur skal standa øllum borgarum landsins í boði. Og somuleiðis øllum kommunum javnbjóðis rættindi og skyldur. Verða tænastur sum t.d. barnaansing, at hjálpa teimum heimleysu, eldraforsorg ella aðrar sosialar fyriskipanir og tænastur ikki stungnar út í kortið frá landspolitiskari síðu, fáa vit eina sera óhepna ójavnvág, soleiðis at kommunur, sum átaka sær hesar skyldur í álvara, verða alt ov hart tyngdar av teimum fíggjarligu byrjum, sum hesar somu skyldur bera í sær.

Áheitan mín til landsstýriskvinnuna í almannamálum skal tí vera, at hon, ongantíð ov skjótt, ger greitt ein almannapolitikk í breiðastu merking fyri alt landið, so fólk hava møguleika at búleikast og trívast í heimstaði sínum ella so nær honum sum gjørligt. Verður tað ikki gjørt, loysa vit ongan trupulleika,- vit flyta hann bert úr einum stað í annað.

Spurningurin er fyrst og fremst ein spurningurn um hugburð. Er vilji til at hjálpa teimum veikastu í samfelagnum ella ikki. Um hvussu fíggjarliga býtið millum land og viðkomandi kommunur skal verða, er ein einfaldur matematriskur spurningur.

**Tórfinn Smith,**
**býráðslimur í Havn**

# Góði Kofi

Aðalmálið hjá sitandi landsstýri er eftir øllum at døma ikki at tryggja føroyingum eitt lív í sátt og semju í Føroyum. Aðalmálið er harafturímóti at finna útav, hvussu landsstýrið kann skaða viðurskiftini í ríkisfelagsskapinum mest møguligt.

Hetta minnir ikki sørt um støðuna, tá irakiski herurin, undir tí sonevnda flógvakrígnum, ongan møguleika sá sær longur at vinna kríggið. Tá byrjaðu teir at seta eld á oljuútbúnaðin í Kuveit, tí hóast tú ikki kanst vinna, so kanst tú altíð oyðileggja mótpartin.

**Brævið til ST**

Nú fréttist at landsstýrið hevur sent bræv til ST, har teir kæra sína neyð um samráðingargongdina við donsku stjórnina. Millum annað verður sagt, at danska stjórnin vil ikki akta ein stóran meiriluta á Føroya Løgtingi. (Av góðum grundum verður einki sagt um, hvussu stórur hesin meiriluti er).

Endamálið við brævinum er heilt greitt at seta donsku stjórnina í ringt ljós, bæði millum føroyingar og úti í stóru verð.

Hetta er enn eitt dømi um tann Sadam Huseinska taktikkin. Nú landsstýrið ongan møguleika sær fyri at vinna fullveldisstríðið, skulu ríkisfelagsskapurin og Danmark oyðileggjast mest møguligt.

**Alternativt bræv**

Hóast brævið til ST ikki er stórt í vavi, so gevur tað eina skeiva fatan av viðurskiftunum í ríkisfelagsskapinum.

Eitt alternativt bræv til Kofi Anand kundi tí meira hóskandi ljóðað nakað soleiðis:

Góði Kofi.

Vit eru eitt lítið land og tralkað fólk í danska kongaríkinum. Hetta hevur verið okkara støða síðani 1380. Líka síðani tá hava kongar og stjórnir kúgað okkum.

Síðani 1948 hava vit havt eina sokallaða heimastýrisskipan (home rule), sum hevur tikið alla ábyrgd frá okkum. Hetta førdi við sær, at vit í nógv ár keyptu, uttan at gjalda nakað fyri tað.

Sum tygum skilja góði Kofi, so mátti hetta enda við, at vit fóru á húsagang. Og sum tygum eisini duga at síggja, so vóru tað ikki vit- men danskarar, sum høvdu skuldina.

Umframt hetta so fáa lesandi føroyingar í Danmark ein sokallaðan føroyafrádrátt, sum hevur við sær, at tey ikki sleppa at gjalda skatt til danska statin, fyrr enn tey hava vunnið yvir 70.000 krónur, og harumframt noyðast tey at móttaka hægsta lestrarstuðul í heiminum (3.500 krónur um mánaðin). Ja tað er enntá so gali, at sjálvt um tey fara í onnur lond enn Danmark at lesa, so forfylgir hesin stuðul teimum.

Av tí at vit soleiðis eiga nóg mikið av lummapeningi, eru vit eitt ferðandi fólk. Men eisini her renna vit okkum í tann imperialistiska múrin. Tí um vit fáa hjálp frá donskum ambasadum í fremmandum londum, so sleppa vit ikki at gjalda fyri tað.

Eina ferð um árið móttaka vit ein kekk á 125 milliónir dollarar frá donsku stjórnini. Vit sleppa ikki at gera herðskildu, sum aðrar frælsar tjóðir, og eisini finnast fleiri onnur ræðandi dømi um okkara avmarkaða frælsi.

Sum tygum skilja, so finna vit okkum ikki í hesi eyðmýkjandi støðu longur.

Um tygum hyggja út ígjøgnum vindeygað, so síggja tygum einki føroyskt flagg. Hetta prógvar enn einaferð, at Føroyar eru eitt kúgað land.

So góði Kofi. Tað vildi glett okkum, um tygum kundu greitt okkum frá hvørjar mannagongdir hava verið nýttar, tá aðrar tjóðir, sum hava livað undir líknandi korum sum vit (um nøkur finst) eru loystar úr sínum trælabandi.

Tað skal undirstrikast, at ætlanin er ikki at nýta hetta bræv, ella eitt møguligt svar frá tygum til nakað sum helst.

NB! Vinarliga vís ikki danska sendiharranum brævið.

**Jóhan Petur Johannesen**

# Søkir sjálvur um bæði loyvini

Nú síggi eg í bløðunum, at Jákup Egholm Hansen, saman við øðrum, er farin at gremja seg um, at fiskimálaráðharrin hevur ætlanir um at geva tvey rækjuloyvi aftrat, tí dagarnir verða ikki brúktir.

Jákup Egholm Hansen átti nú at unt øðrum eisini at sloppið framat. Og ikki er neyðugt hjá honum at gremja seg heldur, tí sami maður hevur havt eitt gullrandað tunfiskaloyvi, sum hann hevur selt í fleiri ár til japanar og eisini er hann saneraður fyri einar 17 milliónir krónur!

Kenni eg Jákup Egholm Hansen rætt, so hevur hann søkt um bæði rækjuloyvini frá Fiskimálastýrinum!

**Ólavur í Beiti**







Altjóða fíggjarheimurin er nú komin nærri føroyingum. Kaupthing bjóðar tær at gera íløgur í altjóða parta- og lánsbrøv. Við virksemi í Luxemburg, New York, Stokholmi og Íslandi, eru vit altíð kunnaði um nýggj rák innan altjóða fíggjarheimin. Tosa við okkum og vit finna í felag eina loysn, ið hóskar til júst tín tørv.

SANSIR TEL 355355

KAUPTHING
FØROYAR · ÍLØGUBANKI
Tinghúsvegur 14 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com